# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Margháttligur tíðindaflutningur

Í seinastuni hava vit upplivað margháttligan tíðinaflutning í almenna útvarpinum hjá KVF. Ein søga um studning úr Vinnuframagrunninum til ein tónleikabólk er blást upp til at verða høvuðssøgan í okkara almenna loftmiðli.

Í stuttum snýr hetta seg um, at tónleikabólkur hevur fingið studning úr Vinnuframagrunninum til konsertferð uttanlands, hóast reglugerðin sigur, at studningur kann ikki verða latin til konsertferðir. Her kann sostatt vera talan um eitt mistak, men sum grunnar virka um okkara leiðir, so er nevndin suveren, tá tað snýr seg um at tulka reglurnar. Fer ein nevnd av leið í sínum tulkingum, eigur eftirlitsmyndugleikin, landsstýrismaðurin, sjálvsagt at fremja hóskandi tiltøk. Men viðkomandi nevnd er farin frá, nýggj nevnd er tilnevnd og sostatt skuldi hetta mál verið farið.

Málið, sum hevur fingið starvsfelagar okkara í Sortudýki at ressast úr bjarnadúri, tykist ikki vera nakað stórt mál. Hartil kemur, at torført er at síggja, hvussu politiski myndugleikin skal kunna seta nøkur tiltøk í verk ímóti nevnd, sum er farin frá. Nýggja nevndin hevur boðað frá, at hon fer at síggja til, at reglurnar verða greiðari og at ráðgevaraskipanin verður strammað upp.

Hóast hendingin við studninginum til konsertferðina kann tykjast átaluverd, tykist viðgerðin hinvegin í útvarpi kringvarpsins vera ein stormur í einum vatnglasi. Okkara almenni tíðindastovnur hevur serstakliga fokuserað á ávísan ráðgeva, sum hevur mælt til nevnda studning og hevur umrøðan verið bæði ógvuslig og margháttlig. Umrøðan hevur verið kryddað við primitivum effektum, løgfrøðiligum statistum og sera løgnum innsløgum, eitt nú við, at yrking hjá faðir ráðgevans og sum viðkomandi ráðgevi hevur sett lag til, varð send millum innsløgini. Hetta er alt sera løgið, minnir ikki sørt um persónsforfylging og ein má spyrja, um tað veruliga er soleiðis, at tíðindatænastan í almenna loftmiðli okkara tulkar ásetingarnar í kringvarpslógini um public service skylduna.

Í grein 10 í kringvarpslógini er nevniliga ásett, at Kringvarp Føroya skal í programmvirkseminum leggja dent á upplýsingar- og talufrælsi, sakliga og óhefta upplýsing og eitt fjøltáttað tilboð, sum varðveitir og fjálgar um mál, mentan, átrúnað og siðalæru føroyinga. Okkara almenni miðil skal sostatt leggja dent á óhefta upplýsing í sínum virksemi og spyrjast kann, um tíðindaleiðslan veruliga metir henda groteska útvarpsleikin í tíðindasendingini vera sameinligan við public service ásetingarnar í kringvarpslógini.

**Sosialurin**

## Sosialdemokratiskt misminni ella pellarí



TÓRBJØRN JACOBSEN

Ein hervilig sótt man hava lopið á føroyskar javnaðarmenn, nú teir so javnan eru mismintir. Ella hevur hendan herviliga veljarakanningin hjá Fynd kanska kámað somikið fyri sannleikakodexinum, at teir av øllum alvi royna at pella seg burturúr aftur ringu støðuni.

Í sjónvarpstíðindum í vikuni gjørdu Bjørn Kalsø og Annita á Fríðriksmørk eina rættiliga sandwish um politiska formann teirra, Jokaran og krúnprinsin, ið sat eftir sum ein politiskt gjøgnumbukað kjøtflís. Avdúkaður fyri opnum skíggja sum stórpellari. Og nú er tað brúkaraumboðið sum er atvoldin til, at Eyðgunn Samuelsen hevur fingið sama trupulleika.

Bjørt Samuelsen greiðir ógvuliga væl frá málinum, á portalum og í avísum. Hon kundi havt tikið meiri rívan til, hevði hon lagt í, men orð hennara eru tó nóg trivalig til, at pellarasóttin rekur Eyðgunn Samuelsen í blekkhúsið, har hon uttan at blunka heldur uppá, at: ”ABC setti brúkaraumboðið á stovn.”

Hetta eru loddrøtt ósannindi, og tað veit Eyðgunn Samuelsen betur enn nakar annar, tí hon er fyrsta honds vitni í málsgongdini, sum fíggjarnevndarlimur fyri Javnaðarflokkin. Fyrra ABC-samgongan vildi ikki vita av brúkaraumboðnum. Tað var ikki fyrrenn Bjørt Samuelsen, sum vinnumálaráðharri, fekk málið ígjøgnum á tingi, at brúkaraumboðið gjørdist ein lógligur veruleiki.

Brúkaraumboðið skuldi skipast og mannast pr. 1. januar 2009. Táið formaður Javnaðarfloksins og fíggjarmálaráðharrin, Jóanes Eidesgaard, kom á ting 30. september 2008 við løgtingsfíggjarlógaruppskotinum fyri 2009, var brúkaraumboðið ikki nevnt við einum orði, ikki einum stavi, tað var ikki so frægt, at umboðnum var stovnað ein konta.

Nógv er sagt og skrivað um famøsu semjuna, sum ein samd fíggjarnevnd gjørdi í stóra partsálitinum til hesa nógv umrøddu løgtingsfíggjarlóg. Nógv hildu lítið um, at Tjóðveldi og Miðflokkurin sáttaðust við samgongulimirnar um ein stóran part av lógini, men brúkaraumboðið er eitt av málunum, sum Tjóðveldi kravdi inn í løgtingsfíggjarlógina, fyri yvirhøvur at ganga við til seming um nakað sum helst. Tað eydnaðist (konta no. 06-37.1.15, 1,2 mió. kr), og fyri rættvísisins sakir skal tað nevnast, at Eyðgunn Samuelsen var okkum ein sera góð hjálp í hesum málinum, hóast formaður hennara hevði valt brúkaraumboðið frá, táið hann snikkaði busjettið til fyri verandi ár.

Hetta er veruliga søgan um brúkaraumboðið, sum ikki hevði verið sett á stovn suðuri í Vági hendan dagin, hevði onkur annar enn samgongan ikki havt rullað við politisku vøddunum í fíggjarnevndini. Hartil skal eisini sigast, at núverandi landsstýrismaður í vinnumálum, Jóhan Dahl, ikki eigur minsta veti av brúkaraumboðnum, hóast hann er íðin og sjáldsama framsøkin, nú hesin veruleiki kann brúkast sum politiskt bringuprýði.

Negativi brúkarapolitikkurin hjá Javnaðarflokkinum er eisini eyðsýndur í ólavsvøkupakkanum, har formaður teirra mælir tinginum til at strika árliga stuðulin til Brúkarasamtakið, - á hundrað túsund krónur. Eina av atkvøðunum fyri hesi niðurlaðing átti javnaðartingmaðurin Eyðgunn Samuelsen.

## Vit spara einki við at leingja bíðilistarnar



HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður

Í juli mánaði boðaði Heilsumálaráðið frá, at sambært útrokningum hjá ráðnum, fór játtanin til sjúkraviðgerð uttanlands í ár ikki at halda. Tí blivu sjúklingar, sum ikki høvdu bráðfeingis tørv á viðgerð, settir á bíðilista.

Hetta við bíðilistum, hevur ofta verið viðgjørt fyrr, men eg loyvi mær kortini at endurtaka, at langir bíðilistar eru í longdini ikki nøkur sparing – tvørturímóti.

Tað at bíðitíðin til sjúkraviðgerðir er long, merkir, at fólk í nógvum førum skulu ganga fyri einki í langa tíð, meðan tey bíða eftir eini viðgerð, sum ofta kann avgreiðast eftir lítlari løtu. Og meðan tey bíða og eru óarbeiðsfør, er ikki óvanligt, at tey fáa veitingar frá Almannastovuni.

Tað sum landið á henda hátt sparir á játtanini til heilsumál, verður mist aftur á játtanini til almannamál. Talan er sostatt um at flyta útreiðslur ímillum tvær konti hjá sama kassa. Tað er ikki at spara!

Um vit harafturímóti stytta bíðilistarnar, so kostar tað í fyrsta umfari at seta fleiri fólk í viðgerð, men í longdini viðførir hetta, at vit fáa eitt størri tal av frískum, arbeiðsførum og vælnøgdum borgarum, sum ikki hava tørv á hjálp frá Almannastovuni. Og tá ið bíðilistarnir eru burtur, lækkar talið av viðgerðum niðuraftur á sama støði sum tað er í dag. Almennu útreiðslurnar til sjúkraviðgerð lækka tí aftur, og harumframt lækka útreiðslurnar á almannaøkinum eisini, tí færri eru sjúk. Afturat hesum økjast inntøkurnar hjá landskassanum, tí fólk koma skjótari út aftur í arbeiðslívið.

Fíggjarlógin fyri 2010 verður løgd fyri løgtingið um stutta tíð. Undirskotið er stórt, so tað er freistandi at skerja allastaðni, har nakað er at skerja. Men at spara sjúkraviðgerðir burtur, lækkar ikki útreiðslurnar hjá almennu Føroyum. Tvørturímóti!

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.